# Tobbi leggur kortini á borðið

**Landsstýrismaðurin í fiski- og tilfeingismálum kunnger í dag alt tað, sum hann eigur og er limur í, og hann heldur, at allir politikarar áttu at gjørt á sama hátt**

GJØGNUMSKYGNI
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað var í Degi og viku í síðstu viku, at Tórbjørn Jacobsen hevði á orði, at tað nú kendist soleiðis, at hann sum politikari átti at kunngjørt øll síni fíggjarligu viðurskifti alment.

Nú hevur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í fiski- og tilfeingismálum gjørt av, at hann skal almannakunngera øll síni fíggjarligu viðurskifti og allar teir felagsskapir, sum hann er limur í ella hevur samband við.

Í Danmark var fyri nøkrum árum síðani orðadráttur um hesi viðurskifti. Anders Fogh Rasmussen, forsætismálaráðharri, gjørdi av at krevja, at allir ráðharrarnir løgdu upplýsingar um síni viðurskifti alment fram, og soleiðis varð tað gjørt.

- Eg haldi, at tað hevði verið so upplagt, at allir landsstýrismenninir og allir teir føroysku politikararnir eiga at almannakunngera síni fíggjarligu viðurskifti, og at allir politikararnir kunnaðu um teir felagsskapir, sum teir eru uppií.

Er hetta nakað, sum tu hevur tosað um við floksformannin hjá tær, Høgna Hoydal, og við løgmann Jóannes Ejdesgaard?

- Nei, tað havi eg ikki. Høgni og eg hava tíðum tosað um hetta, og tí veit eg frammanundan, at hann er samdur við mær í, at hetta eigur at vera gjørt. Nú er hetta tó mín egna avgerð, og eg dugi ikki at síggja, at nakar trupulleiki skal vera í tí, at løgmaður og floksformaðurin ikki eru kunnaðir um tað.

### Tvær orsøkir

Tíðindaskriv um síni viðurskifti fer landsstýrismaðurin at leggja á heimasíðuna hjá Fiski- og tilfeingismálaráðnum seinni í dag, men Sosialurin hevur frá landsstýrismanninum fingið upplýsingarnar, sum hann fer at leggja á heimasíðuna.

*Hvør er orsøkin til, at tú gerst hetta?*

- Tað er bæði ein politisk og ein umsitingarlig orsøk. Tann politiska er, at tað í orðaskiftinum og ikki minst, tá ið tað stendur nógv á, verður sagt bæði eitt og annað og eisini nógv gitt. Tá ið eg nú leggi upplýsingarnar fram, so er ikki neyðugt at gita. Í staðin ber til at sláa upp á heimasíðuni og fáa upplýsingar staðfestar, sigur Tórbjørn Jacobsen.

- Umsitingarliga orsøkin er gegnisspurningurin í ráðnum. Ásetingarnar hesum viðvíkjandi eru ógvuliga strangar. Hesar vikurnar, sum eg havi verið landsstýrismaður, hava embætisfólkini fleiri ferðir spurt meg, um eg havi fíggjarlig áhugamál í tí, sum verður viðgjørt. Fyri at lætta um arbeiðsgongdina havi eg gjørt av, at tey í staðin fyri at spyrja meg, kunnu sláa upp á heimasíðuni.

*Men í tí, sum tú ætlar at kunngera, eru ikki upplýsingar um, hvussu partafeløgini, sum tú ert í, eru skrúvaði saman?*

- Tað er tí, at hetta ikki hevur beinleiðis við mín persón at gera. Eg sigi, hvørjum eg eri uppi í og eigi í. Ársfrágreiðingarnar fyri eitt nú felagið, sum hevur verið so nógv umrøtt seinastu dagarnar, Pf. Kongshavnar Útgerðarfelag, ber tað altíð til at fáa fatur á hjá teimum, sum eru áhugað í tí, roknskapirnir við øllum upplýsingum eru jú alemnninginum tøkir, sigur Tórbjørn Jacobsen.



## FAKTA

**Fakta um Kongshavnar Útgerðarfelag:**

| | 2006 | 2005 | 2004 | 2003 |
|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | 733.000 | -23.366.000 | -3.805.000 | -6.908.000 |
| **Eginpeningur** | -12.070.000 | -12.803.000 | 10.563.000 | 14.679.000 |

Kongshavnar Útgerðarfelag hevur havt nøkur ring roknskaparár á rað, sum hava minkað eginpeningin úr 14,7 milliónum krónur niður í minus 12 milliónir – ein negativ gongd upp á 26 milliónir krónur árini 2003 til 2006

**Partabrøv, sum Kongshavnar Útgerðarfelag eigur sambært ársroknskapinum 2006:**

| | |
|---|---|
| Partabrøv Eik Banki | 5.000 kr |
| Ábyrgdarfæ, Norðoya Sparikassi | 2.000 kr |
| Partabrøv Sparekassen Nord Holding | 16.643 kr |
| Felagið Dvørgarmoy | 2.000 kr |
| Atlantic Supply Base P/F | 50.000 kr |
| P/F Dagsbrún | 5.250.000 kr |
| **Tilsamans** | **5.325.643 kr** |

**Ognarviðurskifti landsstýrismansins:**

Ábyrgdarpeningur í Norðoya Sparikassa: 1.000,-
Partapeningur í Pf. Kongshavnar Útgerðarfelag (av kr. 1.001.000,-): 250.000,-
- viðurskiftini í felagnum annars eru almenn í roknskapum felagsins.
Partapeningur í Pf. Atlantic Petroleum (áljóðandi): 240.000,-
Partapeningur í Pf. Føroya Banki (70 partabrøv á tekningarkurs kr. 189,-): 13.230,-
Partapeningur í Pf. Eik (15 partabrøv á tekningarkurs kr. 575,-): 8.625,-
Simplir kreditorar 0,-
Sethús á matr. no. 103 við Kirkjuveg 4, Tórshavn (Norðoya Sparikassi veð við ognarveðbrævi)
½ sethús á matr. no. 42b í Glyvra bygd
Bilur (Volvo S40)

**Skipaður limaskapur í felagsskapum:**

Eysturoyar Tjóðveldisfelag
Limur í bólkinum sum ætlar at seta upp standmynd av Tróndi í Gøtu í Norðragøtu
Grindamannafelagið
Felagið Høganes
Umboðsráðið í Norðoya Sparikassa
Nes Sóknar Sjúkrakassi
Gøtu Ítróttarfelag (Víkingur)
NSÍ
Kappróðrarfelagið NSÍ
StÍF
Gøtu Fornminnisfelag
Føroya Skipara- og Navigatørfelag
Fólkakirkjan
Nevndarlimur í Pf. Dagsbrún í Fuglafirði. Bað um at verða loystur úr nevndini, táið eg varð settur landsstýrismaður.

# Natúrligt at leggja kortini á borðið

**- Eg haldi, at tað hevði verið gott um allir politikarar gjørdu sum Tóbjørn Jacobsen og løgdu kortini á borðið. Men eg haldi ikki, at vit skulu løggeva um hetta, tí tað má vera upp til hvønn einstakan politikara, um hann vil gera tað, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsformaður**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hergeir Nielsen, løgtingsformaur, vísir á, at tað kann vera eitt og annað í persónligu viðurskiftunum, sum einstakir politikarar ikki brýggja seg um kemur fram alment – og tá tað soleiðis verður latið upp til hvønn einstakan politikara, so kann veljararin meta sjálvur, um ein politikari vil fjala nøkur viðurskifti ella ikki.

Hergeir Nielsen vil fara víðari við gjøgnumskygninum til eisini at fata um valstríðið.

- Eg haldi, at tað skal verða veljarunum púra greitt, hvørjir fíggjarligir stuðlar eru hjá valevnum í valstríðnum, sigur hann og sipar til tað kjakið, sum var í valstríðnum seinast.

Hergeir Nielsen sigur, at tað skal vera púra greitt, hvørji fíggjarlig áhugamál bera fólk á ting.

- Vit vita, at gomlu valdømini í fleiri førum taka seg saman kring avís valevni, men tað er eisini sera týdningarmikið, at vit veljarin veit, hvørji fíggjarlig áhugamál bakka upp kring ymsu valevnini, sigur Hergeir Nielsen, løgtingsformaður.

Tingformaðurin skilir væl, at Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, nú stígur fram og almannakunnger síni viðurskifti.

- Hatta er heilt natúrligt, at hann ger hatta júst nú – og tað er eisini sera gott, um hatta verður tað, sum fær aðrar politikarar at gera tað sama, sigur Hergeir Nielsen, sum kortini leggur dent á, at hetta skal vera upp til hvønn einstakan – og ikki vera eitt krav frá tinginum ella at lógevast skal um tað – tí tað verður kortini upp til veljaran at gera av, um onkrir politikarar ikki vilja leggja síni kort á borðið, heldur løgtingsformaðurin.



*Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, heldur tað vera eitt gott hugskot, at allir politikarar almannakunngera alt tað, sum teir eiga og eru limur í*